


Formaðurin í Føroya Skipara- og Navigatørfelag handar einum av limunum og veteranunum í føroyskari fiskivinnu, Ingolvi Rasmussen, felagsnálina á Atlantic Fair. Mynd Jan Müller/oljan.fo

# Atlantic Fair endar í dag

**Jan Müller**

14.05.2015 - 13:05

Oljan.fo

Nú ræður um at skunda sær, um man vil síggja teir 171 básarnar á stóra Atlantic Fair tiltakinum í Klaksvík, tí tað endar í dag kl. 16. Eftir nógvar spennandi og áhugaverdar fyrilestrar teir báðar fyrstu stevnudagarnar er nú ein framløga eftir. Hon verður kl. 14 og er tað Hanus Samró, rithøvundi, sum fer at viðgera ta sera áhugaverdu søguna um føroyska fiskimarkið. Hesa hevur hann júst umrøtt í nýggjari bók.

Ikki kann sigast annað enn, at fyrireikararnir við Áka í Skemmuni á odda og vinna og myndugleikar í Klaksvíkar Kommunu hava dugað ómetaliga væl at fáa eitt so stórt tiltak eftir føroyskum viðurskiftum at koyra og rigga so væl. Rós til teir fyri tað. Eingin ivi er heldur um, at nógv samstarvs- og vinarbond eru knýtt hesar dagarnar í landsins fiskivinnuhøvuðsstaði.












ÁLÍTANDI LOYSNIR



